## Apríl

# Fótbólturin fór á rull

**1. apríl**

Stóri spurningurin undan vikuskiftinum er, hvørt tað verða Neistin ella VÍF, sum verða meistarar í manshondbólti.

**4. apríl**

Tað varð Neistin. Í seinasta dystinum á árinum vunnu teir 27-22 á VÍF, og so var endaspælið fullkomið hjá teimum bláu, sum vunnu allar 12 dystirnar í endaspælinum.

Í Klaksvík hevði Stjørnan longu tryggjað sær FM undan seinasta dystinum, men dagurin gjørdist ikki minni stuttligur av teirri orsøk.

Brøndby hálvsnávar í donsku superliguni, tá teir spæla javnt móti Vejle.

Gary Kasparov kemur væntandi til Føroyar at telva Nær hetta verður, er tó ikki endaliga greitt, men roknast kann við, at hetta verður antin í summar, ella á sumri 2001.




*Fótbóltskappingin fer í gongd, og í hesum sambandi gevur Sosialurin út serblaðið, Fótbóltur 2000. Í samband við prentanina av blaðnum, vitjar Sosialurin eisini hjá føroysku fótbóltsútisetunum*

**5. apríl**

Herfølge vinnur á Viborg, og eru nú sjey stig framman fyri Brøndby í donsku superliguni.

B36 leikararnir, Kenneth Jaocbsen og Klæmint Matras hava verið eina í Watford, har teir hava vant.

Henning Jarnskor fer til Íslands, har hann ætlandi skal verða liðfelagi við Pól Thorsteinsson

**6. apríl**

Rógvi Johansen gerst nummar trý í danska A-bólkinum í fyrstu súkklukappingini á árinum.

**7. apríl**

Borðtennisárið er um at vera liðugt, og hjá yngru leikarunum varð FM avgjørt um vikuskiftið.

**8. apríl**

Eingin rennibreyt verður um Tórsvøll. Býráðið í Havn sigur, at peningur er ikki tøkur til endamálið.

**11. apríl**

Landsliðsleikarin, Hans Fróði Hansen, sum spælir fótbólt í Noreg, brýtur fyri triðju ferð óstbeinið.

Venjarin hjá AGF og Óla Johannesen, Peter Rudbæk, fær sekkin frá leiðsluni í felagnum. Kent Nielsen og Lars Lundkvist hava í fyrstu atløgu ábyrgdina av superliguliðnum.

Hondbóltsfeløgini enda árið við stórum gallakvøldið. Millum annað verða ársins leikarar kosnir, og her vunnu Vesna Tomajek og Ingi Olsen. Kári Mortensen fær serstaka virðisløn fyri drúgva tænastu á vøllinum.

Herfølge tapir í donsku superliguni, men missa bert eitt stig, tí Brøndby samstundis spælir javnleik.

**12. apríl**

Ikki færri enn 10 útisetar eru á føroyska fótbóltslandsliðnum, sum fer til Liktinstein at spæla.

Rigmor N. Joensen setti met, tá hon vann kappingina í hálvum maraton.

Paula Eikhólm og Petur Niclasen gerast føroyameistarar í borðtennis.

**13. apríl**

HB skal spæla móti ungverskum liði í summar, tá Inter-Toto kappingin er á skránni.

Tveir danskir heimsmeistarar vitja í Føroyum. Tað er ÍSB, sum hevur fyriskipað vitjanina.

**14. apríl**

Sosialurin er á staðnum, tá FCK tapir brotssparkskapping móti AB í fjórðingsfinaluni í donsku steypakappingin. Toddi Jónsson, sum spældi ein góðan tíma, var alt annað nøgdur um dómaraavrikið. Dómarin hevði m.a. givið Toda gult kort fyri at filma.

Ungdómslandsliðini hjá kvinnum og monnum fara til Danmarkar á venjingarlegu.

**15. apríl**

Fótbóltur 2000, sum Sosialurin gevur út undan landskappingini, verður prentað á Dansk Avistryk í Glostrup.

Óli Johannesnen noyðist at geva avboð til landsliðið. Hann hevur fingið skaða í knæðið.

FM í talvi byrjar á Oyrabakka.

**18. apríl**

Nógvur steypafótbóltur hevur verið um vikuskiftið, og luttakararnir til fjórðingsfinalurnar eru so smátt farnir at mynda seg.

Jákup Mikkelsen og Herfølg e mugu taka til takkar við tapi, tá Aab vitjar. Eftir dystin sigur Jákup við Sosialin, at hann varð skumpaður í ryggin, tá Aab legði seg á odda.

Neistin skipar fyri hondbóltsgalla fyri yngru leikararnar, og úti við 1.000 børn vóru til tiltakið.

**19. apríl**

Sonhard Johannesen vinnur FM í einstaklingakappingini í billard. Sonhard spælir á liðnum hjá Klaksvíkar Klubba, sum eisini vann liðkappingina.

FCK tykist at vera burtur úr kappingini um europeisku plássini. Mánakvøldið taptu teir fyri OB.

Ólavur Simonsen, John Rødgaard og Flóvin Tór Næs eru á odda í FM-kappingini í talvi.

Fótbóltur 2000 kemur á gøtuna. Blaðið er hesaferð 56 litsíður til støddar.

**20. apríl**

GÍ og Kaupthing hava skrivað undir sponsorsáttmála.

**26. apríl**

Óli Johannesen sleppur ikki á lið hjá AGF, og nú royna bæði TB og GÍ at fáa landsliðsmannin í sín part.

Landskappingin í fótbólti fer í gongd. Mest óvæntaða úrslitið er, at KÍ á heimavølli tapir fyri NSÍ.

B36, sum í fyrsta umfarinum fekk hjálp frá Jens Martini Knudsen, hevur nú ein Íslendskan málverja, sum skal royndarvenja við felagnum.

Herfølge heldur fast um oddasessin, men nú er bert eittans stig niður til Brøndby á øðrum plássi.

John Rødgaard, Flóvin Tór Næs og Torjørn Thomsen enda allir á fremsta plássinum í FM í talvi. Umdystir er tí neyðugur, og er hetta fyrstu ferð, at tríggir telvarar telva umdyst. Nær hetta verður, er ikki greitt.

**27. apríl**

Fleiri áhugabólkar innan frælsa ítróttin gera vart við misnøgd sína um, at Tórsvøllur ikki hevur rennibreyt.

KÍ arbeiðir við at fáa tveir jugoslaviskar leikarar til felagið. Talan er um ein áleypara og ein málverja.

ÍSB heldur árligu FM kappingar sínar. Á hesum verða ársins svimjarar eisini kosnir, og eru tey Jóannis Ziska og Unn Mortensen.

Kvinnulandsliðið í flogbólti fekk silvur, tá tær vóru í Danmark á venjingarlegu.

Ragnar Rasmussen og Ingun Hansen vinna einstaklinga-FM í badminton.

**28. apríl**

Fótbóltslandsliðið vinnur 1-0 í útidysti móti Liktinstein, men landsliðsvenjarin er alt annað enn nøgdur um avrikið. Venjingarstøðan hjá leikarunum er ov vánalig, heldur Allan Simonsen

ÍSF forsetin, Heðin Mortensen, tekur seg úr nevndini í Tórsvølli. ÍSF hevur einki at gera í grunninum, um vøllurin bert er ætlaður fótbóltinum, er grundgevingin fyri hesum.

Óli Johannesen ger av, at tað verður TB, sum fær gleðina av fótbóltsevnum hansara fram til summarsteðgin.

**29. apríl**

Rullandi redaktiónin hjá Sosialinum setur spurning við, hvørt ítrótturin fyllir ov nógv í føroyska samfelagnum.



## Mai

# Jákup og Herfølge skrivaðu søgu

**2. mai**

Tá landsliðið ikki tykist vera serliga væl fyri tíðliga á árinum, ætlar FSF at flyta ætlaðu dystirnar móti Svøríki og Noreg

Tað dregur út hjá KÍ at fáa jugoslavisku leikararnar til landið, men nú verður roknað við, at hetta verður fyrsta dagin.

KÍ hevur helst eisini brúk fyri nýggjum leikarum, tí eftir tvey umfør eiga teir framvegis fyrsta stigið til góðar. Hesa ferð tapa teir 1-0 móti HB. HB er saman við B36 á odda eftir tey bæði fyrstu umførini.

Á Scilly-oyggjunum taka genturnar hjá Jarnbardi øll á bóli, tá tær gerast nummar fimm í HM-kappingini í gig-róðri. Manningin hjá Eysturoyingini megnar ikki at koma í finalubólkin hesaferð.

Kreppa er í Herfølge. Teir missa oddasessin eftir at hava tapt heili 5-0 fyri Brøndby, sum nú er nummar eitt.




*Jákup Mikkelsen skrivar føroyska fótbóltssøgu, tá hann sum fyrsti føroyingur gerst meistari uttan fyri føroysku landoddarnar. Sosialurin var við, tá Herfølge fekk gullmerkini*

**3. mai**

GÍ hevur fignið fatur á donskum verjuleikara at styrkja um liðið. Talan er um 22 ára gamla Martin Thomsen.

FM-kapping í reiðskapsfimleiki hevur verið á Kambsdali.

Fótbóltskappingin hja kvinnunum er farin í gongd, og meistarrnir úr HB tykjast vera væl fyri.

**4. mai**

FSF áleggur TB bót, fyri at teir ikki møttu upp til allar dystirnar í bólkaspælinum um løgmanssteypið.

Í stórari samrøðu sigur Óli Johannesen, at hann als ikki slept dreyminum at um liva av fótbóltinum. Hetta hóast tað í løtuni tykist heldur tungt.

**5. mai**

John Petersen er í samráðingum við íslendska Leiftur, har Jens Martin Kndnusen er venjari.

**6. mai**

B36 formaðurin avsannar, at B36 roynir at fáa hendur á fyrrverandi KÍ-málverjanum, Stephen Boyle.

**9. mai**

So at siga alt U-21 landsliðið í hondbólti verður útilokað frá landsliðsarbeiði. Hetta tí HSF metir teir hava brotið avtalur við sambandið.

Føroyameistararnir úr Klaksvík fáa fyrsta stigið á árinum, tá teir spæla javnt móti VB. B36 hevur hinvegin lagt seg einsamalt á odda eftir triðja sigurin á rað.

Í Herfølge er lagið nú aftur batnað. Efitr 4-1 sigurin á Lyngby, er liðið aftur ovast í donsku superliguni. Kurt Mørkøre skorar, tá Sogndal á heimavølli spælir javnt.

Bæði Jóvan Telling og Árni Joensen vunnu gullmerki í NM í boccia.

**10. mai**

Í kvinnudeildini tykjast tað serliga vera tey bæði havnarliðini og KÍ, sum fara at dystast um FM.

**11. mai**

Í triðju deild hjá monnum eru tað teir báðir uppflytararnir úr AB og B36, sum hava lagt seg á odda eftir trý tey fyrstu umførini.

**12. mai**

Gullið hjá Herfølge nærkast alsamt, og nú eru bert 17 dagar eftir, áðrenn kappingin er liðugt leikt.

Í stórari samrøðu greiðir Jákup Mikkelsen frá, at hann framvegis hevur ætlanir um at sleppa út um landoddarnar at spæla fótbólt.

**13. mai**

Í FCK eru í øðini. Sjónvarpssending hjá TV avdúkar, at leikarar á besta liðnum hava nýtt stimbrandi evni, men eingi nøvn verða sett á, hvørjir hesir eru.

**16. mai**

Tað er nú avgjørt, at John Petersen skal til Íslands at spæla fótbólt. Venjarin hjá Leiftri, Jens Martin Knudsen, metir hetta sum stóran styrk. Hinvegin er talan um stóran miss hjá B36, sum enn heldur fast um oddasessin, eftir at teir vinna heili 11-1 á sumbingum.

Hefølge vinnur aftur um vikuskftið, og eru nú fýra stig framman fyri Brøndby, sum tó eigur ein dyst til góðar.

Í Noreg vinnur Sogndal við Julian Johnsson sum besta manni stórsigur.

Suðuroyar Sparikassi og VB leingja sponsoravtaluna í enn tvey ár.

**17. mai**

Heimsins besti kvinnuligi hondbóltsleikari, Anja Andersen, kemur til Føroya. Tað er Formula.fo, sum hevur vitjanina í lag.

Í Danmark spælir Brøndby javnleik, so støðan hjá Herfølge er nú enn betri.

**18. mai**

Jugoslavarnir, sum KÍ hevur bíðað leingi eftir, koma endiliga til landið.

Í Danmark riggar FCK seg til klassikaran móti Brøndby. Todi Jónsson hevur brotið fingurin, men fær væntandi spælt.

**23. mai**

Rok tekur seg upp í Klaksvík, har ein áskoðari hevur sligið annan linjudómaran í dystinum millum KÍ og B68.

Hóast hetta, so er lagið í Klaksvík kortini gott, og tað frættist, at nógvir fara til Danmarkar, har teir ætla sær at síggja Jákup Mikkelsen gerast danskan meistara.

Í steypakappingini eru báðir finaluluttakarnir frá 1999 úti.

Í landskappingin er B36 framvegis á odda við fullum stigatali. Seks stig eru niður til næsta liðið.

Í næstbestu deildini eru EB/Streymur og TB á odda, nú fýra umfør eru leikt.

Í Noreg er Kurt Mørkøre aftur á rætta staðum, tá Sogndal spælir javnleik móti Kongsvinger.

Uni Arge hevur fingið skaða í økslina. Friður í seks vikur sigur læknin.

B36 arbeiðir við at fáa ein enskan leikara til landið, nú John Petersen er farin til Íslands.

Áki Olsen, sum var við á FM-liðnum hjá Neistanum, boðar frá, at hann komandi ár verður aftur í barndómsfelagnum, VÍF.

Anja Andersen hevur nú vitjað í Føroyum, og millum annað er úrslitið, at Katrin á Neystabø og Jacklin Durhuus nú fara til Slagelse at spæla hondbólt.

**24. mai**

Í kvinnudeildini eru tað nú serliga HB og KÍ, sum gera um seg.

Í samrøðu við Sosialin, leggur Anja Andersen størstan dent á, at hondbóltsspælið eigur at vera undirhald. Tað skal vera stuttligt.

**25. mai**

Í Danmark tykjast tær báðar, Eyðvør úr Dímun og Helga Ellingsgaard, at stórtrívast í Hillerød. Í samrøðu siga tær annars, at kvinnufótbóltur í Føroyum og Danmark als ikki kann samanberast.

**26. mai**

Stóri maðurin í Keypmannahavn, Flemming Østergaard, tykist ikki nervaður av úrslitunum hjá FCK. Hann roknar við, at FCK – við Toda sum lyklaspælara – innan heilt stutta tíð verður at finna í oddinum.

Í aðrari samrøðu sigur føroyski leikarin í FCK, at hansara mál í FCK so avgjørt er at gerast meistari.

**27. mai**

Herfølge eru danskir meistarar. Eitt umfar fyri kappingarlok tryggjað teir sær gullmerkini, tá teir spæla javnleik á útivølli móti Silkeborg.

**30. mai**

Í seinasta dystinum hjá Herfølge er spenningurin um DM burtur. Hetta ger tó ikki veitslurómin minni í Herfølge, har Sosialurin er á staðnum, meðan gullmerkini verða handað Jákup og teimum. Mótstøðuliðið í seinasta dystinum er FCK við Toda Jónsson á liðnum.

Umframt at Jákup við hesum gerst fyrsti føroyski fótbóltsleikarin, sum vinnur meistaraheiti utan fyri Føroyar, er hetta eisini minsta felagið, sum nakran tíð hevur vunnið DM.

Í bestu heimligu deildini tapir B36 fyri fyrstu ferð, tá KÍ vitjar í Gundadali. Teir eru tó framvegis á odda í deildini.

**31. mai**

FCK boðar frá, at heimsgitni bretin, Roy Hodgson, verður nýggjur venjari í høvuðsstaðarfelagnum.